Í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

# Stríðast um troyggju hjá Beckham




Tá fótbóltsliðið LA Galaxy, sum hevur bretan Daivd Beckham á liðnum, spældi ein dyst á Hawaii herfyri, læt Beckham eftir dystin tveir dreingir fáa sínar troyggju. Tað skuldi hann ikki havt gjørt, tí nú eru foreldrini hjá hesum dreingjum farin at klandrast um, hvør skal eiga troyggjuna. Foreldrini eru so ósamd, at tey hótta hvør annan við sakarmálið fyri at fáa avgjørt stríðið. Ítróttarstjóri í LA Galaxy hevur eitt hugskot um, hvussu stríðið kann avgerast: Dómarin skal taka ein saks og klippa troyggjuna í helvt, og so kunnu dreingirnir fáa hvør sín part av troyggjuni.

# Vatikanið undrast á Time-lista



Amerikanska tríðarritið Time hevur gjørt ein lista yvir tey 100 fólkini í heiminum, sum hava størsta ávirkan, og Benadikt XVI pávi er ikki at finna á hesum lista. Kendir amerikanarar sum Andre Agassi, Brad Pitt, Angelina Jolie og onnur eru við á listanum, og ein talsmaður fyri Vatikanið undrast yvir listan.

- Í grundini eru vit fegin um, at pávin ikki er við á hesum lista, tí listin er løgið samansettur, sigur Federico Lombardi.

# Gongur strilti hjá Cohen



Tað skapti stórar yvirskriftir, tá ið tað varð avdúkað, at legendan Leonard Cohen skuldi hava konsert í Danmark í juli mánaði. Men sølan av atgongumerkjum hevur ikki gingið so væl, sum fyrireikararnir høvdu roknað við. Higartil eru 7000 av teimum 14000 atgongumerkjunum seld.

Fyrireikararnir hava gott mót, og teir rokna framvegis við, at tað verður útselt til konsertina, sum verður hildin í Ráðhúsparkini í Århus tann 6. juli.

# Franco snýtti Cliff Richard



Ein sponsk sjónvarpssending vil verða við, at bretin Cliff Richard skuldi havt vunnið Tónleika Grand Prixið í 1968 við sanginum Congratulations, men spanski einaræðisharrin Franco syrgdi fyri, at spaniólar vunnu ístaðin.

Francisco Franco skuldi sambært sjónvarpssendingini syrgja fyri, at tað var snýtt í sambandi við atkvøðugreiðsluna, so at spanski Massiel vann við sanginum La La La.

# Grønlendingar leggja av

Nýggj tøl hjá Statens Institut for Folkesundhed vísa, at 66 prosent av grønlendingum roykja. Nógvastaðni hevði tað verið eitt sera høgt tal, men í Grønlandi er tað prógv um, at grønlendingar eru farnir at leggja av at roykja. Í 1993 royktu 78 prosent av grønlendingum, men síðani er talið støðugt fallið, og nú er tað so komið niður á 66 prosent. Fleiri átøk eru gjørd fyri at fáa grønlendingar at leggja av at roykja, og tey hava eftir øllum at døma havt ávirkan.

